TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## KUNNGERÐ

Sum kunngjørt av ríkisumboðsmanninum verður fólkatingsval týsdagin 20. november 2001

Valt verður soleiðis:

1. Fólk í Havn, Mjørkadali og Hoyvík, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi.

2. Fólk á Argjum velja í róðrarneystinum á Argjum.

3. Fólk í Norðradali og Syðradali velja í skúlanum í Norðradali.

4. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak.

5. Fólk í Kollafirði, á Oyrareingjum og Signabø velja á kommunuskrivstovuni í Kollafirði.

Atkvøðugreiðslan verður millum kl. 9.00-20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Tey, sum vegna sjúku ella av øðrum orsøkum ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu boða frá á Snarskivuni, tlf. nr. 315160, lokal 135, til leygardagin 17. november 2001.

Samstundis verður sagt frá, at valkort til fólkatingsvalið verða send øllum teimum, ið standa á vallistanum. Um veljari ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal boðast býráðnum frá hesum.

**Tórshavnar kommuna**

SNARSKIVAN



## Reingerðarfólk til Miklagarð

**Miklagarður í SMS sóknast eftir reingerðarfólki at arbeiða í vikuskiftunum og eisini sum avloysari.**

Løn eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð og spyr eftir Johnny Priess.

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 11



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## SKEIÐ Í NOVEMBUR

**Retouchering av myndum** Nýtt!
1 dag: 13/11 kl. 08:30 - 15:30

**Grundskeið í rokniarki v/MS Excel**
4 x 3 tím: 14/11, 21/11, 28/11, 05/12 kl. 19:00 - 22:00
19/11, 26/11, 03/12, 10/12 kl. 19:00 - 22:00

**Lær at nýta Internetið**
4 x 3 tím: 16/11, 23/11, 30/11, 07/12 kl. 08.30 - 12:00

**Lær at nýta teldu**
4 x 3 tím: 19/11, 26/11, 03/12, 10/12 kl. 13.30 - 16:30

**Grundskeið í HTML og Internettøkni** Nýtt!
2 dagar: 20/11, 21/11 kl. 08.30 - 12:00

**Víðkað skeið í rokniarki v/Excel**
4 x 3 tím: 21/11, 28/11, 05/12, 12/12 kl. 08.30 - 12:00

**Heimasíðusmíð v/Dreamweaver** Nýtt!
3 dagar: 23/11, 30/11, 07/12 kl. 08.30 - 12:00

**Grundskeið í datagrunni v/Access**
4 x 3 tím: 27/11, 04/12, 11/12, 18/12 kl. 19:00 - 22:00

**Oplæg til sikkerhedspolitikker/risiko-overvejelser/procedurer** Nýtt!
1 dag: 27/11 kl. 08:30 - 15:30

**Heimasíðusmíð v/FrontPage 2000** Nýtt!
2 dagar: 05/12, 12/12 kl. 08.30 - 12:00

TEL 320 204 http:\\kvasir.farodane.fo



## Sethús í Gørðum í Vestmanna til sølu

Húsini liggja tætt við skúlan og ítróttarhøllina í einum sera barnavinarligum umhvørvi.

Grundøkið er 500 $m^2$ og húsini eru 120 $m^2$ til støddar í trimum hæddum.

Í kjallarahæddini eru hjallur, vaski- og fýrrúm, amboðsrúm og restin av kjallaranum er eitt stórt inrætta rúm, sum kann nýtast til fleiri endamál.

Í miðhæddini eru gong, wc og baðirúm, tvey kømur, køkur og stova.

Í loftshæddini eru gong við køki, wc og baðirúm, trý kømur og stova

Tey sum eru áhugaði kunnu ringja á tlf. nr. 424615 og 424163.



**Heimarøktin Sundalagið/Eiði**

## Heimahjálpari

Søkt verður eftir fólki at arbeiða sum heimahjálpari á Eiði 25 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 01. desember 2001.

Ynskiligt er, at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella hevur kunnleika og royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til økisleiðaran á tlf. 333249.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Heimarøktin øki 2**
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Umsóknarfreist 26.11.2001.



Søkt verður eftir

## Handilsfólki

Vit sóknast eftir einum handilsfólki til búnýtisdeildina á Hjalla at byrja beinanvegin. Viðkomandi skal hava áhuga í handilslívinum og vera dugnalig/ur og ágrýtin.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av viðskiftafólki, viðlíkahald av handlinum og tær dagligu bókføringarnar fyri deildina.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava nakað av royndum við telduarbeiði og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur hóskandi útbúgving – ella royndir í handilsvinnuni.

Umsókn við møguligum prógvum viðmælum skal vera okkum í hendi áðrenn hósdagin 15. nov. 2001.

**P/F Litaval**
Box 1019
Tlf. 342500 · Fax 342503
E-mail: bav@litaval.fo
100 Tórshavn



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



## Frá Tvøroyrar Kommunu

Skattalistin fyri árið 2000 liggur frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni frá mánadegnum 12. november 2001 til og við mánadagin 26. november 2001.

**Tvøroyrar kommuna**
800 Tvøroyri




# Illgruni um ILA við Kunoyarnes

**Alibrúkið hjá Faroe Salmon á Kunoyarnesi hevur havt stórt felli seinastu tveir dagarnar. Tí er djóralæknin, sum fríggjamorgunin tók royndir, boðsendur. Stórur illgruni er um, at ILA eisini hevur rakt hetta alibrúkið. Svarið uppá trupulleikarnar er koppseting, metir stjórin**

ILA
*Stefan í Skorini*



*Alibrúkið hjá Faroe Salmon á Kunoyarnesi er kanska rakt av ILA. Illgruni er um sjúkuna í einum ringi. Royndir verða sendar til Noregs í næstum, og bíðað verður nú í spenningi eftir svarinum, sum væntandi kemur mikudagin*

*Mynd: SáH*

Jón Purkhús váttar fyri Sosialinum, at stórur illgruni er um, at ILA virusið er í einum av ringunum í alibrúkinum á Kunoyarnesi.

– Stórt felli hevur verið í einum av ringunum, og vit hava illgruna um ILA. Vit boðsendu tí djóralæknanum, sum skal gera kanningar og taka royndir av laksinum. Vit vænta at fáa endaligt svar úr Noregi mikudagin, sigur Jón Purkhús, stjóri í Faroe Salmon, ið heldur til í Klaksvík.

Í Sosialinum fríggjadagin spáddu formaðurin í Havbúnaðarfelagnum Hans Jacobsen og landsdjóralæknin Bjørn Harlou, at ILA fór óivað at breiða seg um alt landið. Henda søgan kundi bent á, at spádómar teirra nú gerast veruleiki.

Enn er ILA ikki staðfest í ringunum, og bíðað verður eftir endaligum svari.

Tað eru starvsfólk av Fiskasjúkutænastuni, ið hava verið og tikið royndirnar. Tey vilja ikki siga við vissu, at talan er um ILA, men vilja bíða til tey síggja úrslitið av royndunum úr Noregi. Tað einasta tey hava staðfest higartil er óvanliga stórt felli í einum ringi.

Jón Purkhús sigur, at talan bara er um tann eina ringin. Hinir sjey ringarnir í hesum alibrúkinum liggja nakað burturfrá, og hann vónar tí at kunna taka tann laksin.

– Laksurin í hinum ringunum er búgvin til tøku, og tí fara vit at taka hann rættiliga skjótt, sigur Jón Purkhús.

500 tons ganga í ringinum, har stórt felli hevur verið seinastu dagarnar, og hetta er ein stórur ringur. Um teir klára at taka laksin í hinum ringunum skjótt, so verður fíggjarligi missurin ikki eins stórur, enn um talan var um laks, sum júst varð settur út.

### Koppsetið beinanvegin

Jón Purkhús sigur, at alarar ikki kunnu verja seg fyri ILA.

– ILA er komið fyri at vera, og tað ber ikki til at verja seg fyri tí. Einasta loysnin er at koppseta laksin, og vit mugu byrja beinanvegin.

Hann vil vera við, at um alarar ikki kunnu byrja við at koppseta sum skjótast, so fer tað at hava álvarsamar avleiðingar fyri alarar í Føroyum, og alivinnan fer ikki at hóra undan sjúkuni.

– Sleppa vit ikki at koppseta, verður lítið av aling eftir um eini trý ár, sigur ein dapurskygdur Jón Purkhús, sum leggur afturat, at í USA og Kanada eru alarar longu farnir undir at koppseta, og tað skulu føroyingar eisini.

Orsøkin til at alarar í Føroyum ikki kunnu koppseta er, at reglur í ES banna hesum, og tá størsti parturin av fiskinum fer á ES marknaðin, mugu vit boyggja okkum fyri hesum.


Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



## Føroya Tele í Suðuroy søkir eftir fólki

"Tað er góðskan av tínum arbeiði, sum vil gleða Guð – ikki nøgdin"
Mahatma Gandhi



Til okkara deild í Suðuroynni verður søkt eftir fólki at byrja skjótast til ber.
Á Føroya Tele í Suðuroy starvast íalt 9 fólk. Nýggja fólkið skal saman við øðrum starvsfólkum á deildini vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum.

- Skráseting av kaðalneti
- Telefon og kunda avgreiðslu
- Vøru og goymslustýring
- Telebúðar avgreiðsla
- Aðrar uppgávur eftir tørvi.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv í mennandi og avbjóðandi umhvørvi, við góðum arbeiðsumstøðum

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tekniskur assistentur ella líknandi viðkomandi útbúgving.
Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir við EDV á brúkarastøði.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðara tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001

**Umsóknir skulu sendast til**
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!